# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Tove Petersen á Argjum**, andaðist sunnudagin, 77 ára gomul. Bønarhald verður í Vesturkirkjuni mikukvøldið kl. 18.00 Jarðarferðin verður hósdagin kl. 13.00. Tey, ið vilja minnast Tove, kunna lata lata Sambýlinum á Mýrini í Hoyvík eina gávu. Konta í peningastovnunum.

**Tórálvur Skaalum í Sørvági** andaðist í heiminum leygarkvøldið 47 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Sørvágs kirkju mikudagin klokkan 14. Tey ið vilja minnast Tórálv, kunnu lata Kristnastovu í Keypmannahavn eina peningagávu.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at okkara elskaði pápi

**Claus Amondsen**
Frederikshavn

andaðist 14. september 2007, bert 46 ára gamal.
Minningarhald verður við urnuna í Tórshavn.
Lýst verður seinri, nær minningarhaldið verður.

**Hendrik, Bjørn og Gunnbjørg**

**Dagurin**
**18. september. Titus.** Fleiri halgimenni eru við hesum navni, men her verður helst ikki, sum summir halda, sipað til tann Titus, sum Paulus skrivaði bræv til.

# Jórun sýnir fram í Mentamálaráðnum

Jórun Dánjalsdóttir Poulsen letur upp listaframsýning í Mentamálaráðnum mikudagin 19. september 2007, kl. 15.00. Hon sýnir fram málningar, og er framsýningin opin mánadag til hósdag kl. 08.00 – 16.00, fríggjadag kl. 08.00 – 15.00.

Jórun Dánjalsdóttir Poulsen er úr Havn og er fødd í 1949. Hon er útbúgvin á Håndarbejds Fremme Seminarium í Keypmannahavn. Harumframt hevur hon verið 1 ár á vevstovu við myndlist sum tema hjá Margrethe Agger, listakvinnu, eisini í Keypmannahavn.

Umframt at hava undirvíst í vevlist og myndlist við tekstili í 20 ár í Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla hevur hon eisini undirvíst í 5 ár á Føroya Fólkaháskúla við denti á myndlist.

Hon hevur verið við á framsýningum í Føroyum, Danmark og Norra. Eisini hevur hon sett nógvar framsýningar upp, bæði við egnum verkum og verkum hjá øðrum, t.d. nógvar fotoframsýningar í Tilhaldinum í Havn, og nú seinast um Realskúlan í Havn – 1916-66.

Lágargarður í Havn og Ellisheimið í Vágum eru nakrir av almennu stovnunum, har Jórun Dánjalsdóttir Poulsen prýðir veggirnir við sínari list.

Eftir ein steðg í nøkur ár, hevur Jórun Dánjalsdóttir Poulsen verið á skeiði í málningalist og er hetta fyrsta framsýningin við málningum hjá henni.

Tá framsýningin letur upp verður tónleikur at hoyra. Rannvá Jacobsen fer at spæla guitar og syngja, m.a. løg, sum hon sjálv hevur gjørt. Framsýningin verður til 14. desember 2007. Øll eru hjartaliga vælkomin, siga tey í Mentamálaráðnum.





*Mikudagin letur upp framsýning við málningum hjá Jórun Dánjalsdóttir Poulsen í Mentamálaráðnum*

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

-har tað hendir

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

W W W . S O S I A L U R I N . F O